





kapp, men eisini tá vit hyggja at handverksliga partinum av føroysku listini. Her er báturin okkara allra fremsta listarliga eyðkenni, og samstundis eitt brúksamboð.

Suðri í Vági hava tit varðveitt ikki bara ein, men eitt tíggjutal av aldargomlu grindabátunum. Annað er so tann hevd, sum altíð hevur verið í Vági kring skipan av grindadrápi.

Hyggja vit í 100 ára filmin, sum hvørt húskið í Tórshavnar kommunu hevur fingið í summar, so síggja vit eitt grindadráp við Kongabrúnna í 1946. Í litum. Og teir eru ikki tespiligir – litirnir í grindadrápi í gomlu Havnini.

Men eingin rennir undan søguni. Og tað slettis ikki eins egnari søgu. Í umrødda filmi sæst skilliga, hvussu havnarfólk fóru um grind og tvøst fyri hálvari øld síðani.

Við dagsins fjarstøðu kunnu vit siga, at fólk í Havn vóru ikki eins tætt knýtt at havinum og tí, sum havið gav, sum tit suðuri í Vági.

Meðan vit høvdu skrivstovurnar høvdu tit teir stóru fiskaútflytararnar, sum høvdu sambond við katólsk lond úr Biskayabuktini og Spania til Miðjarðarhavið og Grikkaland. Í Havn høvdu vit ikki hesar víðu og ríku havsbrýr og marknaðir.

Meðan tað var sjálvsagt at kalla eini hús við vágna í Vági fyri Valensia, so skilti havnarólk ikki petti av hesari lívligu suðrisku mentan, ið samantvinnaði fiskaarbeiði, fiskaútflutning og lívligt undirhald við dansi – ja, sum var tað í spanska Valensia.

Men gamaní, norðanfjørðs hava vit eisini lært nógv um grind og grindadráp hesi seinast áratíggju.

Ikki bara skipanin og reiðskapurin er vorðin betri og effektivari, men eisini hava vit varnast tað heilsufrøðiliga kring sjálvt drápið. Tí bar ikki til at halda fram við hesum á Eystaruvág og út frá Kongabrúnni.

Seinni kom so ídnaðarliga dálkingin, sum heimshøvini bera, inn í myndina, og landslæknin ræður nú frá, at vit yvirhøvur taka hesa Guðs gávu í munnin, tíansheldur seta hana á borðið. Livst, so spyrst, hvussu tað fer at ganga. Kenni eg ólavsøkuvertir rætt, so fara tit ikki útaftur uttan ein turran grindabita og spikbita.

Men nú tit hava tikið land við Skinnarasker her norðuri, vilja vit í býráðnum geva tykkum eina minnisgávu. Gávan vísir á hetta, sum tit í Vági hava átt og dugað at umsitið so væl og vísiliga.

Fyri hálvari øld síðani hava vit ikki havt karmar til at umsita hesa gávu í Havnini. Og tað er áðurnevnda grindadrápið.

Í hesum 100 ára minnisfilmi um lívið í Havn í hundrað ár sæst, hvussu handalagið varð, tá grind varð hildin til her í býnum. Hevði Miðlaráðið og Filmseftirlitið havt makt, sum tað hevur akt, so hevði hesin filmur helst verið bannaður at víst.

Men sum nevnt, eingin rennir undan søguni. Og myndir, tær siga meiri enn túsund orð, serliga tá tær verða livandi og í litum.

Sum ein ímynd av, hvat tit í Vági eiga og hava varðveitt, vil eg – við skálkinum aftanfyri oyra eitt leygarkvøld í Havn upp undir ólavsøku – handa tykkum hvør sín film um lívið í Havn, soleiðis sum borgarin hevur sæð tað í 100 ár.

Umframt filmin fara vit eisini at handa tykkum 100 ára búmerkið at seta í bringuna.

Vælkomnir til Havnar og alt tað, sum Havnin hevur at bjóða við henda fyrsta føroyska keikantin – og longur inneftir, har Bátafelagið fer at skipa fyri bryggjudansi í kvøld.

Takk fyri henda søguliga heiður at hitta tykkum her í dag og fyri tykkara megnar avrik at rógva norður um fjørð.

Vælkomnir til Havnar !

*Heðin Mortensen*
*Borgarstjóri*